# Lærararnir til reiðar at herða tiltøkini so hvørt

*–Tey rættindi, sum vit hava vunnið okkum, sleppur eingin at røra, sigur Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Eg frykti fyri, at hetta verður drúgvt.

Føroya Lærarafelag hevur brynjað seg til ein langan arbeiðssteðg.

Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag, sigur, at tá ið semingsroyndirnar slitnaðu týskvøldið, var tað so langt ímillum partarnar, at hon dugdi illa at ímynda sær eina loysn.

Men hon vísir samstundis á, at lærararnir eru til reiðar at fullføra tað, sum teir eru byrjaðir uppá.

– Tey rættindi, vit hava fingið, skal ongin røra aftur, sigur hon.

Høvuðskravið hjá lærarunum er, at teir vilja hava betri stundir til at gera tað eyka arbeiði, sum tann nýggja fólkaskúlalógin áleggur teimum.

– Myndugleikarnir hava smoygt eina nýggja lóg niðuryvir høvdið á okkum.

– Men teir mugu eisini verða greiðir yvir, at tað kostar pening, tí eftir hesi nýggju lógini verða nógv størri krøv sett til lærararnar.

– Og tað mugu teir eisini rinda fyri, tí sum er, eru teir føroysku lærararnir longu við at vera afturútsigldir afturímóti starvsfeløgunum í grannalondunum, sum í flestu førum hava bæði betri løn og styttri arbeiðstíðir enn teir føroysku lærararnir hava.

–Tað einasta, vit krevja, er sostatt, at myndugleikarnir betala fyri ta fólkaskúlalóg, sum teir sjálvir hava sett í verk, sigur formaðurin í Lærarafelagnum.



*Vit fara at herða tiltøkini so hvørt tað verður neyðugt. Men teir fara ikki at forða fíggjarmálaráðharranum at sleppa til arbeiðis, sigur Elsa Birgitta Petersen*

### Herða tiltøkini

Elsa Birgitta Egholm sigur, at Lærarafelagið fer at brúka tey amboð tað hevur í eini ósemju sum hesari.

Tí hava allir teir sáttmálasettu lærararnir lagt arbeiðið niður.

Men harumframt hevur Lærara eisini boðað frá blokadum.

Sostatt eru lærararnir til reiðar at herða tiltøkini.

– Fyribils hava allir limirnir í lærarafelagnum lagt arbeiðið niður í øllum teimum nevndum, sum teir sita í.

Einasta nevndararbeiði, sum lærarar taka lut í nú, er tað, sum er beinleiðis tænastuskylda hjá teimum.

Men ein av teimum nevndunum, sum limirnir í Lærarafelagnum hava lagt arbeiðið niður í, er nevndin, sum ger uppgávurnar til próvtøkurnar í summar.

Umframt tær eru fleiri nevndir, sum lærarar sita í.

Men harafturat hevur Lærarafelagið eisini blokerað øll størv, sum eru lýst.

Sostatt kunnu limirnar í lærarafelagnum ikki søkja størv, sum eru lýst.

Fyribils hevur hetta rakt størvini sum lærugreinaráðgevarar, sum eru lýst á Miðstøðini fyri Undirvísingaramboð.

Men verða onnur størv lýst, kunnu lærarar heldur ikki søkja tey.

Formaðurin í lærarafelagnum leggur afturat, at verður tað neyðugt, eru tey eisini til reiðar at herða tiltøkini, men tað verður so hvørt, sum tað kemur, m.a. við fleiri blokadum.

### Fáa frið á Argjum

Annars sigur Elsa Birgitta Petersen, at tey fara ikki at blokera inngongdirnar til fíggjarmálastýrið á Argjum, tí tað halda tey ikki er neyðugt.

– Tað, at lærararnir hava lagt arbeiðið niður, hevur elvt til so stóran ruðulleika, at vit lata tað verða við tað, sigur hon.

Hon sigur, at enn dugir ikki at siga, hvat skal til fyri at fáa samband ímillum partarnar aftur.

# Tað er við bivandi hjarta at vit senda tey smáu í skúla

*–Børnini ganga og mala í býnum mitt í skúlatíðini og tað er til stóran ampa hjá okkum foreldrum, sigur formaðurin í foreldraráðnum í Hoyvík*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Hetta kann ikki halda fram rættiliga leingi afturat.

Thordur Thorsteinsson, formaður í foreldrafelagnum í Hoyvíkar Skúla, er ikki heilt álviligur við støðuna, sum hevur tikið seg upp, eftir at teir sáttmálasettu lærararnir løgdu arbeiðið niður fyrr í vikuni.

Hann sigur, at støðan er rættiliga ótrygg og at tað er við bivandi hjarta, at foreldur senda tey smáu børnini í skúla.

Hann vísir á, at skúlin í Hoyvík mann vera størsti barnaskúli í landinum, tí har ganga børnini bara til og við sjeynda flokk.

Men samstundis munnu fáir skúlar vera so hart raktur av arbeiðssteðginum, sum júst Hoyvíkar Skúli, tí heilir 14 av teimum 24 lærarunum hava lagt arbeiðið niður.



*Í hesum døgum eru nógv skúlabørn at síggja í havnargøtum mitt í skúlatíðini og tað er til stóran ampa hjá foreldrunum, sigur Thordur Thorsteinsson, formaður í foreldrafelagnum í Hoyvíkar Skúla*

Sostatt eru bara 10 lærarar eftir, og tað tað førir við sær, at flestu børnini hava rættiliga nógvar frítímar inn ímillum.

Men hann minnir eisini á, at Hoyvíkar Skúli er beint við Vegin Langa, sum er ein av høvuðsvegunum.

– Tí hava rættiliga nógv foreldur stóran ampa av, at lata børnini fara í skúlan, tí ongin vissa er fyri, at børnini ikki fara oman á vegin í onkrum frítíma.

Lærararnir sum eru, kunnu ikki átaka sær ábyrgdina av børnunum, ímeðan tey hava frítímar.

– Tað er eisini trupult at leggja tímarnar saman, tí so gera lærararnir verkfalsrakt arbeiði og tað kunnu teir ikki.

Formaðurin í foreldrafelagnum sigur, at nógv foreldur hava tikið avleiðingarnar av hesum og hava rætt og slætt tikið børnini úr Skúla.

Hetta er eisini trupult, tí nógv foreldur arbeiða.

Men hendan trupulleika hava summi foreldur loyst við at senda børnini til ommur og abbar at ferðast og m.a. eru nøkur børn farin út á bygd at ferðast.

Men í hesum sambandi renna foreldrini seg í ein annan trupulleika, og tað er, at tey hava skyldu til at senda børnini í skúla.

Tó kann undantak gerast í serligum førum, tá ið tala ner um smábørn og hetta frávikið brúka foreldrini nú.

Thordur Thorsteinsson sigur, at støðan er ótolandi og hann vónar, at partarnir taka samráðingarnar uppaftur.

Og hann heldur avgjørt, at, at tað er Landsstýrið, sum hevur skyldu til at taka samráðingarnar uppaftur.

– Landstýrið hevur sett eina fólkaskúlalóg í verk. Tí mugu teir eisini gjalda fyri hana og tí má ábyrgdinin at taka samráðingarnar uppaftur, eisini liggja á Landsstýrinum.

– Ella mugu teir taka lógina avaftur, sigur Thordur Thorsteinsson.



# Løgtingið ger av hvør atkvøður til fólkaatkvøðuna

*Á heimasíðuni hjá landsstýrinum um fullveldi verður sagt, at føroyingar, sum hava valrætt til løgtingsval, sleppa at atkvøða til fólkaatkvøðuna um fullveldið. Hetta samsvarar ikki við tað, sum Høgni Hoydal áður hevur sagt hevur sagt um sama mál. »Hatta er heldur ikki rætt« sigur Høgni Hoydal »tað fer løgtingið fer at gera av í lógini um fólkaatkvøðuna«*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í umleið tvey ár hevur henda samgongan arbeitt fyri at vinna føroyingum fullveldið. Frá byrjan var sagt, at føroyingar sjálvir skulu avgera lagnu landsins við eina fólkaatkvøðu og tá tað var sagt, reistist ein annar spurningur.

Høvr skal hava atkvøðurætt til eina slíka fólkaatkvøðu.

Hesin spurningur er ongantíð svaraður serliga neyvt og tí ganga fólk og bíða. Og verður farið inn á fullveldisheimasíðuna, so sæst, at tað er ein spurningur, sum upptekur fólk, tí har stendur hann nevniliga eisini.



### Hava valrætt til løgtingsval

Tá spurningurin stakk seg upp av fyrstan tíð var svarið hjá m. a. Høgna Hoydal, landsstýrismanni í sjálvstýrismálum, at heimarætturin skuldi staðfesta hvør hevði atkvøðurætt til fólkaatkvøðuna og heimarætturin skuldi, sambært samgonguskjalinum, vera staðfestur 1. januar 1999.

Vit skriva nú marts 2000 og enn er eingin heimarættur staðfestur og enn er einki endaligt svar komið upp á hvør skal hava atkvøðurætt til fólkaatkvøðuna.

Og tó. Á heimasíðuni, stendur spurningurin um atkvøðuræ ttin og har stendur eisini eitt svar. Men tað samsvarar bara ikki við tað, sum samgongan fyrr hevur sagt.

Har verður spurt: »Hvørji fara at hava valrætt á fólkaatkvøðuni um tann nýggja sáttmálan millum Føroyar og Danmark. Fara lesandi og sjómenn uttanlands og onnur við tilknýti til Føroyar at hava valrætt?«

Svarað verður: »Tað er ikki endalig støða til hetta, men tað mest sannlíka er, at tað vera tey sum hava valrætt til løgtingsval, ið sleppa at luttaka á fólkaatkvøðuni um tann nýggja sáttmálan«.

### Ikki rætt

»Hatta er ikki heilt rætt. Tað er ikki nakað, sum verður avgjørt av okkum her, men tað verður Løgtingið, sum fer at gera av hvør fer at hava valrætt til fólkaatkvøðuna« sigur Høgni Hoydal.

Hann greiðir frá, at tað eru embætisfólk, sum hava svarað upp á handan spurningin og at tey tí hava tikið útgangsstøði í verandi lóggávu.

*Men er tað ikki óheppið, at fullveldisheimasíðan sigur eitt og Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum eitt annað?*

»Tað er tað sjálvsagt, men embætisfólkini hava ikki spurt okkum um handa spurningin. Tí er hann komin at standa sum hann er« sigur Høgni »Men tað er ikki tí, at tey hava gjørt nakað skeivt. Tey hava bara tikið støði í verandi lóggávu. Tá sáttmálin skal til viðgerar í tinginum skal løgtingið senda hann til fólkaatkvøðu við eini lóg, sum millum annað ásetur hvør hevur atkvøðurætt«.

*Tit hava fyrr nevnt heimarættin sum ein lykil til atkvøðurættin til fólkaatkvøðuna, men hann er ikki staðfestur enn, hví og verður hann staðfestur áðrenn fólkaatkvøðuna?*

»Tað er rætt, at tað í samgonguskjalinum stendur, at heimarætturin skuldi setast í gildi í Føroyum 1. januar í fjør, men tað hevur víst seg ikki at vera gjørligt undir verandi skipan« sigur Høgni Hoydal »og tí má hann bíða til sáttmálin kemur í gildi«.



## Astrup hittir fjølmiðlafólk

Mánakvøldið kl. 19 hevur Føroya Blaðmannafelag limafund, og á hesum fundi verður Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka. gestur.

Tá bankastjórin hittir fjølmiðlafólk, plagar hann at koma við tíðindum frá bankanum. Men hetta verður ein øðrvísi fundur, tí Jørn Astrup Hansen fer at tosa um, hvat hann heldur um ta viðgerð, hann og serliga bankin hava fingið í fjølmiðlunum.

Fundurin verður á Parnassinum á Hotel Hafnia.

# Í Klubbagarðinum - ikki í Club 20

*Tað var ikki rætt, tá vit fyrr í vikuni skrivaðu, at nevnin hevði verið á lofti í Club 20, hóast løgreglan var keldan. Hendingin fór fram í garðinum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyrr í hesi vikuni skrivaðu vit, at løgreglan hevði fingið tvær fráboðanir um harðskap seinasta vikuskiftið. Løgreglan greiddi sjálv frá hesum og sagt varð, at hendingarnar báðar - tí talan var um sjálvstøðugar hendingar, skiltu vit - vóru farnar fram inn í Club 20.. Hetta var bara ikki so, tíverri.

Veruleikin er nevniliga, at hendingarnar fóru fram í Klubbagarðinum og ikki inni í Club 20.

### Skaðar umdømi

Toni Dam, sum starvast í Club 20, sigur við Sosialin, at tað er sera óheppið, at Club 20 verður tengd at slíkum hendingum, sum als ikki hava nakað við staðið at gera, tí teir persónarnir, sum vóru meldaðir, sleppa als ikki inn í Club 20.

– Vit hava eina sera greiða og einfalda linju, sum sigur, at vit ikki loyva slíkum persónum inn. Fólk, sum vit kenna fyri harðskap, og fólk, sum fyrr hava barst inni í Club 20, sleppa bara ikki inn og so einfalt er tað, greiðir Toni frá.

Tí, heldur hann, er tað sera óheppið, at teirra dansistað verður drigið upp í eitt mál, sum tað als ikki hevur nakað við at gera.

– Men vit hava verið úti fyri hesum fyrr, og tað er ótrúliga keðiligt, at alt, sum hendir har um vegir, verður tengt at Club 20, sigur Toni.

### Stórt virksemi

Tað er einki yvir at dylja, at júst økið, sum Toni Dam, tosar um er eitt av teimum mest vitjaðu økjunum á kvøldi og um náttina.

– Klubbin heldur til har og tað ger Club 20 eisini. Men umframt tað eru eisini tvær matstovur og ein filmshøll, so tað sigur seg sjálvt, at tað kemur nógv fólk. Men tey koma ikki øll til okkara, sigur Toni.

*Eins og øll onnur dansistøð, hevur Club 20 eisini fólk í starvi, sum hava til uppgávu at ansa eftir, at alt gongur friðarliga fyri seg innandura. Men kundu teir persónarnir ikki forðað fyri, at slíkt hendi á økinum uttanfyri?*

– Nei, tað kunnu teir ikki, tí teir hava ikki loyvið til tess. Duravørðarnir arbeiða í Club 20 og ikki í Klubbagarðinum og tí hava teir einki at gera har, sigur Toni Dam.

Sum umboð fyri Club 20, hevur hann eisini gjørt vart við seg á løgreglustøðini, fyri at fáa teir at vera meira neyvir við sínum upplýsingum til fjølmiðlarnar.

– Og tað kann hava verið við til at skatt okkara virksemi og tað kann ikki vera meiningin, at løgreglan skal gera tað, sigur Toni.

### Løgreglan váttar rættingina

Løgreglan í Havn váttar fyri Sosialinum, at tað, sum Toni Dam førir fram, er rætt.

– Tað er rætt, at tilfeldini eru hend uttanfyri Club 20 og ikki inni. Men annað tilfeldið er meldað, sum tað er hent inni í Club 20. Tíverri hava vit so brúkt Club 20 sum adressu og vit eru sera kedd um vit hava gjørt Club 20 ónáðir, sigur Súni Vinther.

Hann greiðir frá, at tá fólk umtalar Club 20, so er tað ikki altíð, at tey hava verið inni í klubbanum.

– Tað verður brúkt, sum ein adressa. Men vit geva teimum eina umbering fyri at vera brúktar í hesum samanhanginum, sigur Súni Vinther at enda.

NÝTT TELEFON-NUMMAR
3-arin hevur fingið nýtt telefonnummar:
3 x 35

- og nýtt telefaxnummar
35 35 36
3arin
UR GULL SILVUR
FOTO & VIDEO
FLØGUR
SMS · Tel 35 35 35 · Tax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo
SANSIR · TEL 355 355